# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Skammlop helst orsøk til eld í frisørsalong







**Allar helst var tað skammlop, sum var orsøkin til, at eldur kom i Salong McGavin um fimmtíðina seinnapartin**

ELDUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eldurin kyknaði í einum loftsrúmi ovast í bygninginum í Sverrisgøtu í Havn um hálvgum seks tíðina í gjár.

Fólk í einum bygningi nærhendis varnaðust skjótt eldin, og alt fyri eitt varð sagt frá til bæði salongin og til brandstøðina.

- Her vóru einir tveir kundar eftir, og tey fóru sjálvandi út alt fyri eitt, sigur Paula McGavin, sum eigur og rekur salongina.

Hon sigur, at tey nú kanna, hvat er hent, men fyribils bendir á, at talan var um skammlop.

Eigarin av salongini harmast sjálvandi eldsbrunan, men heiltuttan sjálvspeisemi er hon tó ikki.

- Eg má bara siga, at tað er heppið, at eg nú eisini havi salong í SMS. So vit fáa kortini avgreitt sum mest av kundum, sigur Paula McGavin.












Leggið til merkis:
Tað er ókeypis at ferðast við skipum og bussum hjá Strandfaraskip Landsins leygardagin 31. mai 2008

# Hvítusunnucruise við Smyrli 11. mai 2008

**Kom við á árligu hvítusunnucruise hjá Smyrli - eitt upplivilsi fyri alla familjuna. Vit sigla millum oyggjarnar og vitja nógv áhugaverd støð. Frásøgumaður greiðir frá, meðan siglt verður.**

**Ferðaskráin er henda:**
Kl. 09.00 - av Krambatanga
Kl. 12:00 - úr Tórshavn
Kl. 18.00 - aftur í Tórshavn
Kl. 20:00 - á Krambatanga

**Matur:** Morgunbuffet kl. 09:00 - 11:00 • Hvítusunnubuffét kl. 11:00 - 20:00 í kafeteria. 3 rættirs matarskrá í matstovuni Beinisvørð kl. 11:00 - 20:00.

**Undirhald:** Frásøgumaður: Ólavur Hansen. Kim Hansen hugnar um í kafeteria. Búi Dam & Dánjal á Neystabø undirhalda børnini.

**Ferðaseðlar fáast á farstøðini í Tórshavn, í móttøkuni umborð á Smyrli og á kunningarstovuni á Tvøroyri, sum eisini tekur ímóti telefonbílegging á tel. 372 480**

**Prísir:**
Vaksin kr. 300,-
Børn 7-13 ár kr. 100,-
Børn 0-6 ár ókeypis

**Gisting við morgunmati:**
Koyggja kr. 350,-
Dupultkamar kr. 600,-
4-mans kamar kr. 950,-

**Tilmeldingarfreistin er 5. mai 2007**
Allar upplýsingar á: www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS